# BÓKASÍÐAN

*bøkur, bøkur, bøkur…*



*Ritstjórn: Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Høvundurin:

## Nobelvinnari gevst at skriva



*Heimkendi høvundurin, Gabriel Garcia Márquez hevur boðað frá, at hann gevst at skriva*

Kolumbianski Nobelvinnarin í bókmentum í 1982, Gabriel Garcia Márquez, sum millum annað skrivaði altjóða metseljaran *100 års ensomhed*, leggur nú pennin. Í samrøðu við blaðið La Vanguardia sigur Márquez, at hann gevst at skriva av persónligum orsøkum og leggur afturat.

– Við mínum máta at arbeiða, kundi eg uttan stórvegis trupulleikar skriva enn eina bók. Men lesarar varnast tað alt fyri eitt, um tú ikki longur leggur tína sál í eitt verk.

Óvæntaða avgerðin hjá Márquez kemur, júst sum lesarar annars høvdu væntað sær eitt framhald av fyrstu útgávuni av endurminningunum *At leve for at fortælle*, sum kom í 2003. Í bókini fortelur Márquez um sína marglittu familju, sum við sínum søgum legði lunnar undir fantastisku frásagnirnar, Márquez síðani hevur sagt heiminum.

Márquez verður mettur at vera faðirin at sonevndu magisku realismuni. Hugtakið fevnir um eina røð av frásøgueyðkennum, men vísir seg hjá Márquez sum heilt ítøkiligar lýsingar av teimum mest ótrúligum hendingunum. Í *100 års ensomhed*, ið stendur sum ein varði í magiskari realismu, fær hesin frásøguháttur ein heilt serligan týdning í einum latínamerkanskum høpi, har fyribrigdi úr indianskari mentan, spanskari kolonialismu og lokal politisk viðurskifti spæla eina týdningarmiklan leiklut.

# Bøkurnar og eg



*Bjørt Samuelsen dámar væl at sita heitt og fjálgt við eini bók og fylgja ævintýrarum, sum knossast, frysta og sveitta fyri at gera sínar dreymar til veruleika*

**Bjørt Samuelsen, kunningarráðgevi**

*Hvørja bók lesur tú í løtuni?*

– Í løtuni lesi eg *The secret man* eftir Bob Woodward og *Antin Ella* um Søren Kirkegaard eftir Ólav Rasmussen. Báðar fekk eg í jólagávu. Sjáldan eri eg eydnusamari, enn tá eg sleppi at ganga fyri meg sjálva í einum risa bókahandli, gjarna í Oslo ella í Keypmannahavn. Av tí at tíðin tykist tódna við árunum, eri eg vorðin meira málrættað, ella kræsin, um tú vilt. Men eg lesi alt frá skaldsøgum, gjarna krimi, bøkur um heimspeki og sjálvsmenning, søguligar bøkur og ævisøgur.

*Er tað onkur bók, tú minnist serliga væl?*

– Tá tú spyrt um tað er onkur bók, eg minnist serliga væl, so kundi eg nevnt *Wild Swans* eftir Jung Chang, sum eg las fyri 10-12 árum síðani. Hon lýsir Kina gjøgnum trý ættarlið av kvinnum, og er ein óhugnalig frásøgn um, hvussu siðaarvur kann nýtast í kúganini av samfelagsbólkum. Bókin lýsir eisini hvussu fanatisma og fundamentalisma – tað verið seg politisk ella átrúnaðarlig – kann reka eitt heilt fólk inn í ein óndan spiral av harðskapi og ræðsluatburði.

Aðrar bøkur, sum hava rinið væl við, eru sjálvsævisøgur hjá persónum, sum hava livað eitt spennandi lív og sett varðar eftir seg – eitt nú *Long Walk to Freedom* hjá Nelson Mandela, ella *Mit Liv* eftir Gro Harlem Brundtland.

– Eisini er spennandi at sleppa eina ferð við lívsheimspekinginum Arne Næss inn í tankar um kenslur og skynsemi. Ella bøkur um veruligar ævintýrarar. Tá siti eg heitt og fjálgt, og lesi um fjallaklintrarar, heimsumsiglarar ella pólfarar, sum knossa og strevast, frysta og sveitta fyri at røkka málinum undir ekstremun viðurskiftum. Eitt dømi er *Snille piker går ikke til Sydpolen* eftir Liv Arnesen, sum gekk einsamøll til Suðurpólin. Tað, sum dregur við hesum bókum, er ferðin móti dreyminum. Hetta, at flestu dreymar kunnu gerast veruleiki, verða teir gjørdir til ítøkilig mál, sum tú trýrt uppá. Ella, sum sagt við Liv Arnesen: "Snille piker går dit de vil!"

*Hvør var tín fyrsta lesiuppliving?*

– Eg minnist ikki mína fyrstu lesiuppliving, men tað mundi byrja so smátt í forskúlanum hjá nunnunum. Í 10-12 ára aldrinum minnist eg at *De fem*, *Trekløveret* og *Dana-pigerne* vóru á skránni. Havi funnið tær framaftur til dóttrina. Munurin er tíbetur, at stórur partur av bókunum á hennara hill eru føroyskar. Hugsa tær, hvussu fleiri túsund síður um Harry Potter stimbra málførleikan!

*Hvat fær teg at velja tær bøkur, tú lesur?*

– Tað er torført at siga, hvat fær meg at lesa hesa og ikki hina bókina. Eitt ummæli, ein perma sum eggjar, ella sigur mær, at hesa bara MÁ eg lesa. Sum eitt kvøldi, eg fór framvið hjá einari vinkonu. Hon gav mær eina bók, og heimkomin settist eg við náttarfriðinum at lesa *Ro uten årer*. Ulla-Carin Lindquist var kendur svenskur sjónvarpsjournalistur. Mamma at fýra børnum og hevði annars alt, sum eyðkennir eina sanna karrierukvinnu. Aftastu síðurnar í bókini skrivar journalisturin við einum fingri á vinstru hond – tann seinasti, sum virkar, áðrenn sjúkan hevur brotið niður allar nervakyknur og harvið kvett alt samskifti millum vøddar og heila. Vanliga hati eg tárapersarar! Men henda bókin er ósentimentalt og væl skrivað. Óinnballað og poetisk. Stutt men djúp. Rakar kenslu- og tankamiðdeplarnar í senn. Eg sleppi ikki undan at hugsa. Um tíðina, um raðfestingina. Og um hví vinkonan helt, at eg átti at lesa hesa bókina ...

## Pressan úrlatin

Olav Hergel, *Flygtningen*,
Linhardt og Ringhof, 2006




*Populistiska pressan í Danmark verður náðileyst avdúkað í Flygtingen*

Mest umrødda bókin í Danmark í løtuni man uttan iva vera *Flygtingen* eftir Olav Hergel, sum kom út fyri stuttum. Hergel starvaðist í mong á sum blaðmaður á Berlingske Tidende. Tá hann brádliga segði seg úr starvinum, segðist orsøkin vera hansara ónøgd við, at tað var so trupult hjá sær at fáa innivist á blaðnum fyri søgum um flóttafólk. Nú verður so gitt dúgliga, um ikki *Flygtingen* í so máta byggir á veruleikan. Í øllum førum er ein av høvuðspersónunum blaðstjórin Kielland, sum hevur sett øll journalistisk prinsipp til viks, fyri at tekkjast lesararnum og ikki minst harðrenda útlendingapolitikkinum hjá donsku stjórnuni.

Sjálv søgan snýr seg um blaðkvinnuna Rikke Lyngdal, sum hevur støð í donsku hermannaleguni í Irak. Ein dagin sendir Rikke blaðnum eina søgu, har donsku hermenninir sáa iva um, hví teir yvirhøvur eru við í hesum krígnum. Ikki óvæntað noktar Kielland at prenta greinina. Men tá Rikke brádliga verður rænd og pínd av irakiskum yvirgangsmonnum, ger Kielland alt fyri at fáa fatur á søguni.

Skaldsliga stílar *Flygtningen* ikki høgt. Heldur tykist ørindi við bókini vera ein náðileys avdúking av populistiska rákinum í donsku pressuni, har blaðstjórar ikki bara lifra fyri men beinleiðis gera sær dælt av fremmandaræðsluni hjá dønum.

**Stórar, tjúkkar, tunnar, smáar, langar…**

Á Føroyaprent eru allar bøkur vælkomnar
Vit hava drúgvastu royndirnar innan bókaprent

FØROYAPRENT
Hoyvíksvegur 59 | 110 Tórshavn | Tel. 314 555 | www.foroyaprent.fo